## Sethús í Haldórsvík til sølu



Eini sethús á matr.nr. 28 í Haldórsvík eru til sølu um hóskandi boð fæst.

Húsini eru 77m2 til støddar og grundøkið er 261m².

Eisini er jarðarstykkið innangarðs á Fossaleiti á uml. 3283m² á matr.nr. 29 til sølu.

**Áhugað kunnu ringja**
**228830 ella 310117**

## KUNNGERÐ

**um framløgu av broytingum av byggisamtykt**

Sambært løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954, um byggisamtykt og býarskipan við seinni broytingum, verður við hesum gjørt kunnugt, at uppskot til broytingar av byggisamtyktini fyri Sjóvar kommunu verður lagt fram til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni frá 29. aug. 2007 til
19. sep. 2007.

Kapitul VII

**10. gr. Ásetingar fyri J-økini**
• partur av J-øki á Selatrað verður broyttur til B-øki

**11. gr. Ásetingar fyri K-økini**
• partur av K-øki á Selatrað verður broyttur til B-øki

Møgulig mótmæli skulu vera skrivlig, og vera kommunustýrinum í hendi í **seinasta lagi 29. nov. 2007.**

**Sjóvar kommuna**
Skúlavegur 10
490 Strendur

## Leys størv á Dagstovninum við Stórheygg

Søkt verður eftir tveimum pedagogum til Dagstovnin við Stórheygg í Hósvík, 30 t/v ella eftir nærri avtalu at byrja **1. oktobur 2007.**

Annað starvið er í barnagarðsstovu og hitt er í frítíðarskúlanum.

**Vit ynskja, at tú hevur**
• hug at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag fyri børnunum
• virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum og teim vaksnu
• hug til at skapa og seta dám á dagstovnin
• góð samstarvsevni og kann arbeiða sjálvstøðugt

**Vit bjóða**
• eitt spennandi arbeiðspláss, har pláss er fyri ymiskleika
• ein stovn í er í støðugari menning
• eitt arbeiðspláss, har tú kemur at hava ávirkan

**Setunarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Um pedagogar ikki søkja, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

**Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til**
Dagstovnin við Stórheygg: Sunnrid Poulsen, leiðara, á tlf. 772020 ella 472020

Umsóknir við avritum av prógvi v.m. skulu sendast beinleiðis til

**Dagstovnin við Stórheygg**
Áarvegur 3
420 Hósvík
ella við telduposti til: storheygg@sunda.fo

**Umsóknir mugu vera dagstovninum í hendi í seinasta lagi mikudagin 12. septembur 2007.**

*Í Sunda kommunu eru tríggir dagstovnar: á Oyrarbakka, í Hvalvík og í Hósvík. Dagstovnurin við Stórheygg í Hósvík hevur pláss fyri 58 børnum, og har eru í løtuni 11 starvsfólk. Leiðararnir á teimum trimum dagstovnunum hava eitt gott og tætt samstarv í samráð við kommununa.*

## FIRMA & EINSTAKLINGAKAPPING í fótbólti

verður í ítróttarhøllini í Kollafirði 31. aug. 2007 kl. 19.00

Kostnaðurin er kr. 500,- pr. bólk,
har 5 eru í hvørjum bólki

**Vinningarnir eru frá Føroya Bjór :)**

Leikarir, ið spæla í formuladeildini, hava ikki loyvið til at luttaka, og bert er loyvi at hava 1 leikara úr 1., 2. og 3. deild (Møguliga verða broytingar gjørdar viðvíkjandi 3. deild leikarum)

Seinasta freist at melda seg til kappingina er 30.08.07 kl. 20

**Tilmelding er á tlf. 270330 og 263571**
(Aldursmark 18 ár og eldri)

**06y**

## TEKNMÁLSTULKUR

Vegna barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir útbúnum teknmálstulki fyri **tíðaskeiðið 1. okt. 2007 til 30. apríl 2008**

Starvið er 1/2 tíð og er dag-, kvøld-, og vikuskiftisarbeiði
Løn samb. sáttmála millum Starvsmannafelagið og Føroya Landsstýri

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Teknmálstulkatænastuna tlf. 319012 - 219006

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum skulu sendast til:

**Teknmálstulkatænastan**
Íslandsvegur 10 C
100 Tórshavn

TEKNMÁLSTULKATÆNASTAN

## UPP Á TÁ

Byrja verður at dansa sunnukvøldið 16. september kl. 20.00 í fimleikarhøllini í Sørvágs skúla.

Nýggir og fyrrverandi limir eru hjartaliga vælkomnir




Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo